Ólavur sjeyti

Ein unglingi verður sjeyti

Ólavur er ímyndin av kveikjaranum, uppreistrarmanninum og stríðsmanninum. Mangan sýnast málini málleys. Tey hevja seg mangan útum tað, sum vit vanligu deyðilgu halda vera gjørlig. Øll verða heldur ikki til veruleika, men taka vit saman um, so sanna vit skjótt, at nógv bar á mál umsíðir.

Ólavur er mangan ótolin og kann tykjast bonskur við hvørt. Hann berjist náðileyst fyri sínum hugsjónum, og tað kann geva honum óvinir eina tíð. Men tey, sum hava havt og hava við Ólav at gera, hava flest øll virðing fyri honum, tí hann er úrslitasøkjandi.

Eg havi kent Ólav síðan á sumri 1967. Havi eftir førimuni tikið lut í onkrum av hansara tónleikavirksemi; fyrst í Útvarpskórinum og Havnarkórinum, í Føroyakórinum, og síðan hava vit samstarvað í sambandi við Føroya Musikkskúla, frá tí hann kom í eyga seinast í sjeytiárunum og frá tí hann sá dagsins ljós við Reyndarmusikkskúlanum í 1981.

Haldi ikki, at Føroya Musikkskúli hevði komið í gongd, um vit ikki áttu ein hugsjónarmann sum Ólav. Tað var ein fragd at uppliva hansara eldhuga. Fyri hann var tað alt um at gera at fáa ein skúla til teir mongu føroyingarnar, sum hann visti lógu inni við tónlistarliga dýrgripinum. Hann var sannførdur um, at siðvenjan hjá landsmonnum hansara gjøgnum øldirnar við kvæðum, dansi, kirkjusangi og Kingo høvdu rinið við tónleikaevnini hjá tí uppvaksandi ættarliðnum. Hann vildi tí brúka síni manndómsár at velta, sáa og taða ríku tónlistajørðina. Tað gjørdi Ólavur, og hann ger tað enn.

Meg gleðir tað ómetaliga, at Ólavur nú kann frøast um góða úrslitið. Veltan hevur borið góðan ávøkst. Musikkskúlin er veruleiki. Vælútbúnir musikklærarar undirvísa børnum um alt landið. Tónleikalivið blómar allastaðni. Úrslitið sæst aftur í kirkjum og samkomum annars, í kórlivinum, í dansistovunum o.s.fr. Hornorkestrini og størri og smærri bólkar spæla tónleik á høgum listarligum stigi. Symfoniorkestrið er vorðin partur av mentan okkara. Jú, tað grør um gangandi føt. Allar Føroyar vórðu ríkari.

Hugsjónarmaðurin vann upp land. Sjálvt um boðar og flúrar mangan forðaðu á leiðini og sjógvarnir mangar brutu øgisliga í bæði borð, so vann ætlan hansara í havn.

Farast skal longur fram á leiðini. Ólavur hevur stritt sítt góða stríð. Aðrir bera føringin víðari, sum hann setti frá sær við vegin, men hann rættir fegin eina hjálpandi hond enn, tí evnini og viljin eru har framvegis. Gongd er komin á, og nú ynskir eingin at steðga aftur.

Eg fari at nýta høvi at takka Ólavi fyri hansara áhaldni, virkisfýsni og ikki minst vinarlag. Ólavur hevur tey evnini, at sjálvt um bylgjurnar ganga høgt og orðalagið ikki altíð er á einum sømiligum stigi, so vendist altíð aftur. Ósemja skal ikki oyðileggja eitt gott mál, og tað virði eg hann nógv fyri.



Eg fari persónliga at takka fyri tann ótrúliga vælvilja, ja, mangan offurvilja, tú hevur víst Vágakórinum og flest øllum føroysku kórunum, tá á hevur staðið. Tú vart altíð klárur við eini hjálpandi hond, sjálvt um tú bæði mátti um firðir og sund og manga náttina mátti liggja burturi heimanifrá fyri aftur at fara til arbeiðis í Havn tíðliga morgunin eftir.

Tú spardi teg ongantíð og fert neyvan at gera tað heldur, fyrr enn aldur ella heilsa bøyggja kempuna.

Hjartaliga til lukku góði vinur.

Hans Jørgensen

VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini kavæalingur. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavæalingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷3 og ÷6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Hvassur vindur ella skrið av norði og kavæalingur. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og kavæalingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og ÷5 stig.

Hitalagið kring knøttin

Ilulisat	+10
Nuuk	+9
Qaqortoq	+5
Ammassalik	+2
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	6
Lerwick	7
Aberdeen	7
London	3
Tromsø	3
Bergen	5
Oslo	–
Stokkhólm	5
Keypmannah.	3
Helsinki	1
Moskva	+16
Berlin	3
Warzawa	3
Kiev	+8
Bukarest	5
Paris	6
Madrid	9
Róm	–
Malorca	15
Athen	–
Malta	14
Tunis	13
Beijing	3
New Dehli	24
Bangkok	34
Jakarta	26
Sydney	–
New York	3
Miami	23
Los Angeles	13
Meksikobýur	20
Panama	32
La Paz	8
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	32

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 988 hPa. eystan fyri Ísland fer eystureftir og køld luft rekur av útnyrðingi móti Føroyum.



Lágtrýstið við Lofoten stendur mestsum í stað, so køld luft rekur móti Føroyum komandi dagarnar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19.02 kl. 06⁰⁰–20/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í febr.: +11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

AVFALL



Avfallið: 4,0 mm – mált frá 19/02 kl. 06⁰⁰–20/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 98,6 mm

VESTFALLSKYRRINDI

15. febr.: Seinna kvarter
20. febr.: Mánin longst frá jørðini
23. febr.: Tending

Dagur	Suðuroyar-/ Vágsfirði fp.	sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sandsvágnum fp.	sp.	Vestmannasund fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssund fp.	sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasund fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
21. feb.	05:33	17:54	04:33	16:54	04:48	17:09	07:33	19:54	08:33	20:54	03:48	16:09	02:48	15:09	05:48	18:09	06:48	19:09	05:18	17:39	06:33	18:54
22. feb.	06:14	18:35	05:14	17:35	05:29	17:50	08:14	20:35	09:14	21:35	04:29	16:50	03:29	15:50	06:29	18:50	07:29	19:50	05:59	18:20	07:14	19:35
23. feb.	06:54	19:14	05:54	18:14	06:09	18:29	08:54	21:14	09:54	22:14	05:09	17:29	04:09	16:29	07:09	19:29	08:09	20:29	06:39	18:59	07:54	20:14
24. feb.	07:34	19:54	06:34	18:54	06:49	19:09	09:34	21:54	10:34	22:54	05:49	18:09	04:49	17:09	07:49	20:09	08:49	21:09	07:19	19:39	08:34	20:54

www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes